## Vagnur venur í Fremad

Umframt teir ungu føroysku spælararnar, sum í fjør summar komu til Fremad Amager, hevur felagið nú eisini fingið tilgongd av enn einum føroyingi. Talan er um Vagn Mohr Mortensen, sum fyri tað mesta hevur spælt í HB, tó at hann eitt stutt skifti í fjør var at síggja hjá AB. Vagnur hevur eisini verið partur av føroyska A-landsliðnum, og móti ársenda í fyrraári var hann tveir dystir á rað í byrjunaruppstillingini. Hetta í heimadystinum móti Litava og útidystinum móti Fraklandi.



## Øktur áhugi úr Danmark

Danska fótbóltsheimasíðan, bold.dk, skrivar, at í løtuni er stórur danskur áhugi fyri føroyskum spælarum. Heimasíðan hevur prátað við Jákup í Stórustovu, umboðsmann, og hesin sigur, at áhugin er stórur í løtuni. Og at talan er um feløg úr bæði donsku 1. deild og SAS-liguni. Hvussu ítøkiligar fyrispurningar talan er um, kann tó bert tíðin vísa, sigur Jákup leikaraumboðsmaður.

## Atlantic og Amager fara til Turkalands

Saman við flogfelagnum, sum er millum høvuðsstuðlarnar, fer Fremad Amager nú eisini at selja ferðir til Turkalands. Høvið til hetta er venjingarlega, sum Fremad Amager fer á seinast í februar mánaði.

Men umframt at senda spælararnar til knallharða venjing í bakandi sól, gevur føroyska fótbóltsfelagið nú eisini føroyingum møguleikan at koma við á venjingarleguna. Tó við nakað minni av hørðum arbeiði undir sólini. Saman við Atlantic Airways, sum frá byrjan hevur verið partur av Fremad Amager-konseptinum, selur Fremad Amager nevnliga frítíðarferð til føroyingar í tíðarskeiðinum, sum venjingarlegan er.



# Julian skal venja Fremad



*Julian Hansen hevur í nógv ár virkað sum venjari í Danmark. Nú verður tað hjá Fremad Amager, at hann fer at starvast*

**Fremad Amager hevur styrkt um venjarapartin hjá felagnum. Fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin, Julian Hansen, skal vera hjálparvenjari hjá felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er serliga við atliti at stuðla og menna føroysku spælararnar í hópinum, at Julian er settur.

Hann kemur tó hinvegin eisini at virka sum partur av venjingarliðnum kring allan hópin. Julian hevur búleikast í Danmark tey nógvu seinastu árini, og hann hevur eisini tikið donsku venjaraútbúgvingina.

Fyrraárið var hann eitt skifti í Føroyum, tá hann seinasta partin av kappingarárinum var venjari hjá HB, eftir at felagið hevði sent táverandi venjaran, Heine Fernandez, til hús. Í Danmark hevur hann eisini virkað sum venjari. Seinast hjá Skjold.

Julian var eisini partur av føroyska landsliðnum fyrstu altjóða árini. Men eftir dystin í Parkini, har Føroyar taptu 4-1 móti Danmark, boðaði hann frá, at hann gavst á landsliðnum.

# Virkið svimjifelag í Suðuroy

**Í næstum fer Suðuroyar Svimjifelag, til Íslands til stóra svimjikapping, og gongur leiðin til Reykjavíkar. – Hetta mennir íðkararnir, hoyrist úr Suðuroy**

SVIMJING
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Suðuroyar Svimjifelag (SuSvim) fer um vikuskiftið at taka lut í stóru svimjikappingini Reykjavík Open, ið verður hildin 18-20 januar.

Hetta er ein stór kapping har 260 svimjarar, frá 19 feløgum frá Íslandi, Noregi, Svøríki, Niðurlondum og Føroyum taka lut.

At senda svimjarar av landinum til kappingar er partur av framhaldandi menningini av okkara svimjarum, og samstundis fyrireiking til stóru avbjóðingarnar ið standa fyri framman.

Tey, ið fara at umboða SuSvim eru; Shaila Millum Garðarnar, Malan Vitalis Bærendsen, Mona Simonsen, Katharina Lamhauge, Annmari Midjord, Pál Joensen, og Danjal Martin Hoffgaard.

Umframt íðkararnir, verður høvuðsvenjari felagsins, Jón Bjarnason, eisini við til kappingina.

Ferðalagi fer úr Føroyum fríggjadagin, og skulu tey longu til kapping fríggjakvøldið.

Kappingin heldur fram leygardagin og sunnudagin, og tilber at fylgja við hvussu leikur fer, á susvim.com, og eisini verður møguleiki at fylgja við í Live Timing, á http://results.swimrankings.net/main.php?lang=en&compid=11767465



*Ferðalagið hjá SuSvim, ið fer til Íslands fríggjadagin, er her avmyndað*